## RØRSMIÐUR ELLA HANDVERKARI

Søkt verður eftir rørsmiðjum ella handverkarum at byrja skjótast gjørligt.
Vit vænta at tú arbeiðir skjótt og væl, ert álítandi og førur at arbeiða sjálvstøðugt.
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. verða at senda til:

Rør-tænastan
Postsmoga 1106
FO-110 Tórshavn



Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfinn Hansen á tel 22 81 80

**rør-tænastan**
Vatn-Hiti-Sanitet-Ventilatión

## LÆRLINGAR TIL DAMOR

**Virksemi okkara er í vøkstri og tí sóknast vit eftir tveimum lærlingum - einum til handilin og einum til goymsluna**

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og lættur av lyndi, ikki bangin fyri at taka eina hond í har á stendur og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Sum lærlingur hjá Damor fært tú beinanvegin tillutað títt ábyrgdarøki.

Vit bjóða tær eitt starv í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har góður samstarvsandi valdar millum starvsfólkini.

Útbúgvingin fer fram í handli okkara á Hjalla og við skúlagongd í Danmark.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 15. februar 2006

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001

**damor**

## HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN
*HEIMARØKTIN*

## Lýsing eftir starvsfólki til Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum til nýggja Røktarheimið í Streymnesi at byrja 01. mars 2006 ella skjótast tilber.

Røktarheimið er partur av Heimarøktini øki 2, og pláss er fyri 32 búfólkum, sum koma at búleikast í 4 eindum við 8 búfólkum í hvørjari eind.

**Hugsjónin fyri Heimið:**
Miðað verður eftir at skapa eitt heimligt og virkið umhvørvi og við virðing og umsorgan at stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einkulta búfólkinum.

**Vit vænta av tær, at tú hevur:**
- Áhuga í og gleði við at arbeiða við eldri fólki
- Vilja til at starvast í tráð við hugsjónina fyri Heimið
- Er til reiðar at bróta upp úr nýggjum og ganga aðrar leiðir
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Er motiverað og fleksibul
- Kann arbeiða í skiftandi vaktum

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt spennandi og mennandi starv, har tú hevur møguleika at vera við til at byggja upp eitt heim í tráð við hugsjónina fyri Heimið og seta dám á umhvørvið.
- Góða innleiðslu
- Møguleika fyri persónligari menning

**Setanar- og lønarviðurskifti:** Lønar og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.
Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina við setanarstaði í Heimarøktini.
Tænastustaðurin fyribils er Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy.
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara á tlf. 333249/282249

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi , viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin Vágoy/Norðstreymoy**
Att: Sonja Klein, økisleiðari
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist 13. februar 2006**

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og miðnáms-skúladeildin*

## Sjálvlesandi

### Innskriving til students-/HF-próvtøku

Sjálvlesandi, her í millum umgangarar, ið á sumri 2006 ætla sær til students- ella HF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. februar 2006 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan/tað skeiðið, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað at fylla út fæst frá studentaskúlunum og HF-skeiðunum.

Sjálvlesandi skulu rinda 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tey innskriva seg til próvtøku í.

Tá ið tann sjálvlesandi hevur verið til próvtøku í tí/teimum lærugrein/um, hann/hon hevur innskrivað seg til próvtøku í, fær hann/hon pengarnar aftur.

Tórshavn, 1. februar 2006
**Mentamálaráðið**

**Ekspetrisa**

søkist sum feriuavloysari til fjølbroytt arbeiði innan handilsyrki skjótast gjørligt.

Talan er um eitt fulltíðar avloysarastarv.

Vit vænta av tær at tú er røsk og fyrikomandi, og hevur tú royndir innan klæðnahandil hevur tað fyrimun.
Løn S & K

Umsókn við upplýsingum við royndum og útbúgving skal sendast til:

p/f Skálabúðin
Box 178 • Tórshavn

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## HÚS TIL SØLU



Matr. Nr. 57i í Froðba, við ástandandi sethúsum, til sølu. Húsini eru frá 1980 og eru 86m2, grundøkið er 990m2.

Áhugaði kunnu ringja 372930 / 266630

## Aðalfundur

Frítíðarfelagið »Antares« boðar til ársaðalfund á Hotel Vágum leygardagin 4. februar kl. 13.00.
Skrá sambært viðtøkunum.

**Nevndin**